# Ársins bilar í 40 ár

Í ár eru 40 ár síðan Motorjournalisternes Klub Danmark (MKD), fyrstu ferð tilnevndu »Årets Bil i Danmark«, hetta var í 1969.

Í hesum sambandi verður skipað fyri einum tiltakið á FDM Jyllandsringen, nærhendis Silkeborg, í juni mánað, har allir teir 40 bilarnar, sum hava verið ársins bilar í Danmark verða savnaðir á einum staði. Har verður høvi hjá motorjournalistum og ørum við egnum eygum at síggja hvussu bilarnir eru broyttir hesi 40 árini. Tiltakið verður stórt, og danskir fjølmiðlar og sjónvarpsstøðir og vera til staðar.

Fyrsti bilur sum varð valdur til Årets Bil i Danmark, var Ford Capri í 1969 og seinast var Honda Jazz valdur fyri 2009.

*mg*



*Ford Capri frá 1969 var fyrsti bilur sum varð valdur til ársins bil í Danmark*

## Årets Bil i Danmark

**Yvirlit ársins bilar í Danmark 1969-2009**

1969: Ford Capri
1970: Fiat 128
1971: Citroën GS
1972: Fiat 127
1973: Audi 80
1974: Fiat 126
1975: VW Golf I
1976: Simca 1307/1308
1977: Ford Fiesta
1978: Alfa Romeo Giulietta
1979: Fiat Ritmo
1980: Opel Kadett D
1981: Ford Escort
1982: VW Polo
1983: Ford Sierra
1984: Fiat Uno
1985: Opel Kadett E
1986: Ford Scorpio
1987: Peugeot 309
1988: Peugeot 405
1989: Fiat Tipo
1990: Renault 19 GTX
1991: Nissan Primera
1992: Citroën ZX
1993: Mazda 626
1994: Citroën Xantia
1995: Fiat Punto
1996: Fiat Bravo/Brava
1997: Skoda Octavia
1998: Alfa Romeo 156
1999: Ford Focus
2000: Fiat Multipla
2001: Skoda Fabia
2002: Peugeot 307
2003: Citroën C3
2004: Mazda 3
2005: Mitsubishi Colt
2006: Seat León
2007: Opel Corsa
2008: Mazda 2
2009: Honda Jazz

# Opel 110 ár

Hóast Opel verksmiðan er næstan 150 ára gomul eru tað í ár 110 ár síðan framleiðslan av bilum byrjaði.

Í Týsklandi verður gjørt nógv burturúr at 110 ár eru liðin síðan Opel verksmiðjan, sum varð stovnað í 1863, byrjaði at framleiða bilar í 1899.

Í hesum sambandi hava Opel gjørt nakrar serligar útgávur, sum nevnast “Selection 110 Jahre”, sum eru jubileumsmodell, ið verða seld til ein serligan prís.

Opel verksmiðjan, Adam Opel GmbH, var ein sjálvstøðug bilverksmiðja til hon varð yvirtikin av General Motors í 1929.

*mg*




*Opel bilar hava nú verið gjørdir í 110 ár. Her er ein Opel Kapitän frá 1962*



